– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Serstøk akitektteknað hús á Strondum

**Alt er gjørt á besta hátt – bæði innan og uttan. Húsini eru sera snøgg og eru heilt serstøk.**









## Fyrsta fatanin

Fyrsta fatanin er, at í hesi gøtuni standa eini hús, sum eru heilt serstøk. Húsini standa sera væl fyri við blindan veg. Grannalagið er sera hugnaligt og grannarnir eru blíðir og fyrikomandi.

## Húsini

Húsini, sum eru í einari hædd, eru 4 ára gomul, sera spennandi og nakað fyri seg. Einki er spart tá talan er um tilfar og dygd. Frá gongini sleppur tú beinleiðis út í bilhúsið og í hjallin. Húsini hava stóran køk úr besta tilfari, og haðani kemur tú beinleiðis inn í eina stóra stovu við innbygdari peis. Tey eru kødd við timbri og hava steintak. Eisini hava tey ventilatiónsskipan, sentraldust-súgvara, gólvhita í øllum gólvum eins og gosbað og dampkabinu. Húsini standa sera væl og frítt fyri í náttúruvøkrum, friðarligum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg og útsyni er sera gott. Dagstovnur, bygdarhús, skúli, sparkivøllur og busssamband er nær við.

## Stílur og snið – inni og úti

Stílurin er nútímans lættur og ljósur. Alt er í einari hædd og ongar gáttir eru. Opni stílurin innan ger, at tú hevur gott samband við um-hvørvið uttan, men hóast tað, er tað sera fjálgt inni hjá tær sjálvum. Grundstykki er stórt, brotflísar eru runt húsin, og tað liggur væl fyri at gera garð / urtagarð.

## Innan

Har er inngongd, gongd, inngongd til bilhús, fýrrúm, bryggers / vaski-rúm, baðirúm við dampkabinu, hjúnarrúm við atgongd til baðirúm við gosbaði og dampkabinu, 2 køm-ur, køkur / borðstova og stova við peis.

## Fakta

| | |
|---|---|
| **Adressa** | Hálsagøta 14, Strendur |
| **Byggiár** | 2006 |
| **Hæddir** | 1 |
| **Gólvvídd** | 217 $m^2$ búøki |
| **Grundøki** | 617 $m^2$ |
| **Hjallur** | Ja |
| **Bilhús** | Ja |
| **Prísuppskot** | Hóskandi boð |









PF inni
Niels Finsensgøta 37
Postboks 364
FO-110 Tórshavn
Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**